90 SEKUND

LAGT TIL RÆTTIS: Leo Poulsen

# SOLBY ELIASEN



MYND: JENS KRISTIAN VANG

# Evstamark og misnøgd fólk eru tað ringasta

**SOLBY ELIASEN** BYRJAÐI Í STARVSVENJING Í **KRINGVARPINUM** 1. AUGUST 2002, OG VARÐ SETT Í FAST STARV Í **2006**. HON ARBEIÐIR SUM **JOURNALIST**, SUM HON HELDUR VERA EITT **ÁHUGAVERT** OG **PRIVILIGERAÐ** STARV. OG SO FER EIN **STÓRUR** PARTUR AV FRÍTÍÐINI VIÐ AT **BINDA**.

**Um tú ikki hevði tað starv, tú hevur, hvat hevði tú so gjørt?**
Eg hevði óivað sitið í einum peningastovni. Tað var altíð ætlanin hjá mær, áðrenn eg varð rakt av fjølmiðlabasilluni.

**Hvat ger starvið so áhugavert?**
Tað er framúr áhugavert og eitt satt privilegium at hava eitt starv, har tú meira ella minni altíð kanst fylgja við samfelagsgongdini á fremstu parkett. At hava eitt starv, har fólk líta tær upp í hendur at víðarifortelja sína søgu, líkamikið hvør hon er.

**Hvat er tað ringasta við starvinum?**
Trýstið frá bæði evstamarkinum og ónøgdum fólkum. Og tá so atfinningarnar hegla omanyvir, er tað ikki altíð so stuttligt at vera í tílíkum starvi. Til tíðir loyvi eg mær at ivast í, um tey, ið finnast harðast at, yvirhøvur geva sær far um, at tað eru menniskjur við kenslum, ið tey trampa uppiá.

**Hvat er títt størsta scoop?**
Uha...tað veit eg ikki....men onkrar av lagnusøgunum hjá ymsum menniskjum, sum eg plagdi at gera, meðan eg arbeiddi á Sosialinum, har fólk greiddu frá síni sorg, gleði ella hvat tað nú skuldi vera. Í kringvarpinum minnist eg serliga kvøldið, tá Atlantic Navigator rendi á land. Eg var júst byrjað í starvsvenjing, og tað var ein spennandi uppgáva at sleppa at rapportera live í fleiri umførum frá eini tílíkari hending, har vit fylgdu gongdini frá byrjan til enda. Tá fann eg veruliga útav, hvør styrkin hjá útvarpsmiðlinum er

**Var tað trupult at venja teg við at hoyra tína egnu rødd í útvarpinum?**
Ja, sera trupult. Fyrstu ferð eg hoyrdi eitt innslag hjá mær uttan fyri heimið, var eg í eini sølubúð. Tá innslagið fór í gongd, setti eg innkeypskurvina frá mær og fór útaftur.

## Um tú ikki búði í Føroyum, hvørjum landi hevði tú so búð í – og hví?

Eg hevði búð í Ný Sælandi. Tí tað er eitt fantastisk land, sum minnir sera nógv um Føroyar og kortini er fullkomuliga annaðleiðis. Og ikki minst, tí at systir mín býr har.

**Hvat er heimsins mest fantastiska uppfinning?**
Hmmm....vaskimaskinan, uppvaskimaskinan, turkitrumlan, dustsúgvarin....allar maskinur, sum eru við til at lætta um húsligu skyldurnar. Tað manglar bara nú, at tær blíva automatiseraðar, so eg kann eygleiða tær frá sofuni :-)

**Hvat mangla vit at uppfinna?**
....sí omanfyri!

**Hvat er títt frítíðarítriv?**
Einaferð var eg róðurskvinna. Men tað eru so mikið nógv ár síðani, at eg kann valla siga, at tað er mítt frítíðarítriv. Mær dámar ógvuliga væl at binda.

**Dámar tær hundar ella kettur?**
Kettu – eri uppvaksin við kettu, tað er eitt fitt og róligt djór, sum er lætt at passa.

## Hvat ger tú eftir arbeiðstíð?

Eg hugni mær saman við synunum, Petur Martin og Kristian, hyggi eitt sindur í sjónvarp, bindi, vitji vinfólk og slappi av.